# Ítróttarfelag Fuglafjarðar



## ÍF - TB

HAVSBRÚN

Ítróttarfelag Fuglafjarðar
Postboks 94
530 Fuglafjørður
Tel. 444 636
Fax 444 636

# ÍF - TB

**6. umfar í landskappingini hjá 2. deild monnum**
**21. juni 2003**

## Leikskrá 4

**Útgevari:**
*Ítróttarfelag Fuglafjarðar*

**Blaðnevnd:**
*Gunnvá Dam*
*Birgar Larsen*
*Janus Petersen*
*Steinbjørn í Lambanum*
*Rógvi Róin*

**Myndir:**
*Rógvi Róin og Jóhan Símun Joensen*

**Kápumynd:**
*Áki leggur bóltin til rættis, aðrenn hann skýtur brotsspark. Myndin er frá heimadystinum ímóti B71 31. mei í ár, og sum vit vunnu 2-0*
*Mynd: Jóhan Símun Joensen*

**Prent:**
*Ítróttarfelag Fuglafjarðar*

**Uppseting:**
*Rógvi Róin*

TAÐ HALDA VIT

### ? ÁSKOÐARARNIR -
# EIN DYGGUR STUÐUL



Umborð á Dúgvuni til Klaksvíkar síðsta leygardag, helt onkur av áskoðarunum skemtandi fyri, at nýtt meta varð sett í dag. –Tað fóru fleiri enn 12 áskoðarar at hyggja eftir ÍF á útivølli! Tað er kanska nakað um tað. Tí til dystin í Klaksvík, vóru heilt fitt av áskoðarum, sum stuðlaðu okkara monnum, og tað er gleðiligt. –Væl gongur tað væl, og tá eru ofta fleiri áskoðarar enn um tað gongur minni væl. Og er tað nakar, sum kennir tað aftur, so eru tað vit. Tí halda vit tað vera ógvuliga gleðiligt, at liðið nú hevur fjepparar, sum eisini fylgja liðnum á útivølli. Gongdin sæst eisini týðuliga til heimadystirnar, tí talið av áskoðarum hækkar fyri hvønn dyst. Og tað sæst eisini aftur aðrastaðni. Í kassanum hjá ÍF, á avrikinum hjá leikarunum á vøllinum og annars er "stemningurin" í bygdini sum heild, kring fótbóltin, positivur.

Eisini vit á leikskránni merkja økta áhugan fyri liðnum. –Í TIPS 13-kappingini koma fleiri og fleiri svarlepar inn, og serliga í atkvøðugreiðsluni um ársins ÍF'ara, er áhugin vaksandi. Til seinsta heimadystin ímóti VB varð nýtt met sett, tí vit hava ongantíð áður fingið so nógvar atkvøðuseðlar, sum til tann dystin.

Alt hetta er bert at gleðast yvir og vit fara at heita á tykkum um framhaldandi at varðveita positiva andan, og stuðla okkara monnum. Góðu úrslitini á vøllinum er eisini tykkum at takka, eingin ivi um tað.

Góðan dyst!



DYSTURIN Í DAG

### TB VITJAR -
# TOPPDYSTURIN Í DEILDINI!



Vit, sum vóru í Klaksvík síðsta vikuskiftið, tá ið vit leiktu ímóti næstbesta liðnum hjá klaksvíkingum, kunnu bert staðfesta, at aftur hesaferð var talan um ein stríðssigur. - Sjálv um vit áttu størsta partin av spælinum og málmøguleikunum, stóð á til síðsta bríksl.

–Tíðliga í seinna hálvleiki dovnaðu vit eitt sindur, og tað sektaðu KÍ'arnir okkum fyri, og javnaðu eftir gjøgnumbrot frá evnarika David Berholdsen í høgru síðu. Innleggið skallaði Meinhard Hansen í netið, uttan møguleika hjá Fróða at verja fyri. –Faktiskt einasti veruligi málmøguleikin hjá KÍ í dystinum.

Miðskeiðis í fyrra hálvleiki hevði Viggo lagt okkum á odda. -Áki legði fríspark av miðásini inn í brotsteigin hjá KÍ, og við handaru stólpa var Viggo hægstur, og skallaði bóltin hegnisliga - í einum bleytum boga - í handara síðunet, uttan møguleika hjá veteraninum, John William Joensen, í málinum hjá KÍ at bjarga.

Við málinum og yvirvágini í spælinum, hildu flest øll uttanfyri vøllin, at nú fóru vit at fáa okkurt málið afturat. Men eftir málið gjørdist spælið eitt sindur meir óskipað, og KÍ-arnir vístu, at teir ikki vóru fyri "nothing". Tá teir so fingu útjavnandi málið, kom veruligur spenningur í dystin, og okkara leikarar fóru longur fram á vøllin. –Vit vildu hava øll stigini við okkum til Fuglafjarðar.

-Venjarin broytti spælskipanini frá 4-4-2 til 3-4-3. Samstundis framdi hann tvær álopskendar innskiftingar. –Heini og Rúni komu inn fyri ávíkavist Sverra og Atla, sum høvdu gjørt ein góðan innsats. Teir báðir og Ken vóru fluttir fram í álopið, og tað gav eisini úrslit 9 minuttir fyri leiklok. Málskjútti var Ken, sum við lærinum beindi bóltin í málið. Tí gjørdist hesin dysturin aftur ein stríðssigur, kanska heldur óneyðugur. Men tað vísir eisini dygdirnar á okkara liðið. –At megna at vinna ein dyst í síðstu minuttunum! Gott dreingir!

**Tvørámenn á vitjan**

Í dag verður mótstøðan helst harðari enn seinasta vikuskiftið. Tvørámenn vitja við sínum besta liðið, og teir verða helst eitt av teimum liðunum, sum vit fara at kappast við um bestu plássini í deildini. Venjarin hjá teimum, Jón Johannesen letur væl at dystunum higartil, sjálvt um teir ikki hava vunnið allar

*(framhald á bls. 26)*

GULT KORT

# TIL LEIKARAR ELLA ÁSKOÐARAR!

## Viðhvørt er spurningurin, um tað er leikarin á vøllinum ella áskoðarin uttanfyri, sum átti at fingið tað gula kortið!



Kring vøllin standa áskoðarar, viðhaldsfólk og stuðlar. Tey royna, hvør í sínum lagi, at rópa og heppa sítt lið, so sigurin kann koma í hús. Jú, tað hevur stóran týdning fyri ein og hvønn leikara, at hoyra róp frá viðhaldsfólkunum, og ikki minst er tað eggjandi, tá ið lógvabrestirnir hoyrast, eftir eitt flott avrik.

At tað eru einstøk fólk kring vøllin, sum eru í so ágrýtin, at okkurt í ovurhuga verður sagt, sum ikki er serliga uppbyggjandi, skulu vit her lata liggja. Men tað er um eitt annað fyribrigdi, sum seinastu árini meira og meira er at hoyra, sum henda grein skal snúgva seg um.

"Eingin fer val, um annar fer illa" kundi verði eitt gamalt oratak, og tað munnu neyvan verða fleiri, sum ivast í, at so er. Tí fara vit at gera vart við, at tað ikki fremur góðan ítróttananda, tá ið áskoðarar at kalla hvørjaferð, tað verður dømt eitt fríspark, rópa á dómaran, um at geva kort - gult ella reytt. Ein eigur at minnast til, at tá dómarin hevur dømt, hevur hann, minst líka væl - ella kanska betur enn áskoðarin - sæð, hvat er hent á vøllinum. Sostatt kann hann sjálvur meta um, um kort skal gevast ella ikki.

Vit kunnu sjálvandi geva teimum rætt, sum siga, at heimaliðið kann fáa fyrimun, um ein á hinum liðnum fær eitt reytt kort, jú gamaní. Men sera sjálvdan fær liðið fyrimun um gul kort verða givin, kanska er tað heldur hinvegin. Mótstøðuliðið fær fyrimunin seinni í kappingini.

Við hesum hjartasuffi er ikki ætlanin at seta niður á áskoðaranar hjá ÍF. Heldur skal hetta skiljast sum ein áheitan til okkum øll, sum hava tað til felags, at vit vilja stuðla okkara liði so ella so, um at rópa positivt, uttan at siga: "Kort..kort ..." hvørjaferð okkurt er á vási.

Tað er so "in" at tosa um hugbursbroyting, her hava vit so okkurt, vit sum áskoðarar, kunnu hugsa um. Tað ræður nevniliga um at melda rætt út, at spæla trumfin í røttu løtu, og so vóna at ÍF fær síðsta stikk.

síl



## TÚ




**Navn:** Jan Skoradal
**Føðingardagur:** 08.12.1974
**Føðistað:** Tórshavn
**Starv:** elektrikar hjá J.T. Electric
**Pláss á vøllinum:** verjuleikari
**Hædd og vekt:** 186 cm. og 85 kg.
**Yvirtrúgv:** bindi lissurnar á vøllinum
**3 orð sum lýsa teg:** positivur, róligur og treiskur (hann er jú gøtumaður, red.)
**Torførast mótstøðumaður:** Bergur hjá mostur
**Frítíðarítriv:** ítróttur
**Vónir fyri 2003:** at vinna 2. deild

## TÍN ÍTRÓTT

**Fyrsti dystur á 1. liðið:** ímóti VB Vági í 1991
**Nær spældi tú fyrstu ferð fyri ÍF:** í ár móti AB í steypakappingini
**Aðrar ítróttargreinar:** borðtennis - kanska eg kann bjóða Martini av
**Minnigarríkasti dystur:** KÍ - GÍ í 1996. Endaði 1-1, vit javnaðu í síðsta minutti og gjørdust FM-vinnarar 4. árið á rað
**Størstu fótbólstliga ávirkan:** Anton bróður
**Besti fótbóltsleikari:** Zidane
**Um ikki fótbólt, hvørja ítróttargrein hevði tú so valt:** borðtennis
**Hvat slag av venjing dámar tær best:** mær líkamikið - geri tað sum venjarin sigur
**Hvat slag av venjing dámar tær ikki:** sama sum omanfyri
**11 teir bestu fótbóltsleikararnir í heiminum:** Tað er altíð stuttligt at síggja Brasilia spæla

## TÍNIR FAVORITTAR

**Matur og drekka:** skerpikjøt, breyð og mjólk
**Slag av tónleiki:** Gospel-tónleikur
**Sjónvarpssending:** Spin City
**At slappa av:** ein góðan film, dip og chips
**Troyggja nr.:** Nr. 3
**Besti fótbóltsleikari yvirhøvur:** Pelé
**Sjónvarp/filmstjørna:** Mel Gibson
**Besta bók/blað:** Bíblian



O·N·L·Y
VERO MODA

>> vælkomin í KATO
Fuglafjørður




Fysioterapiviðgerðarstova

530 Fuglafjørður
Telefon 44 51 44

Álvur Hansen, fysioterapeutur
Turið L. Petersen, fysioterapeutur

## Lastvognskoyring




**Øll lastvognskoyring verður gjørd**

## Kári Zachariassen

**530 Fuglafjørður**
**tel. 444 245 ella 217 245**

## Føroya Shell

| | |
|---|---|
| Streymoy | 34 74 00 |
| Norðoyar | 45 77 11 |
| Eysturoy | 44 87 11 |
| Vágar | 33 27 11 |
| Sandoy | 36 17 11 |
| Suðuroy N | 37 27 11 |
| Suðuroy S | 37 47 11 |






**HYDRAULIK**
**RÁÐGEVING**
**VERKÆTLANIR**
**ÍSETANIR**
**UMVÆLINGAR**
**MASKINUMVÆLINGAR**
**SVEISING, DREYING, BORING OG FRESING**



## Sølu-og tænastuumboð fyri:

- Rapp Hydema (trol- og hjálpispøl)
- Rapp Hydema Syd (garna- og linuspøl, kraftblokkar, Capstanar)
- Rapp Bomek (skipsútgerð)
- Palfinger (marine kranar)
- Pullmaster (lossi- og kranaspøl)
- Triplex, Hydralift (eykalutir)
- Dension hydraulic (pumpur, ventilar v.m.)
- Danfoss Hydraulik (motorar, pumpur, ventilar,v.m.)
- Vickers (pumpur, ventilar v.m.)
- Rexroth (pumpur, ventilar v.m.)
- Parker Hydraulics (filtur, pumpur, ventilar, fittings v.m.)
- Casappa (tannhjólspumpur 4-40 ltr.)
- Hagglund (spælimotorar)
- Dinamic Oil (kranaspøl)
- Finn Filter (hydraulik-, brennioliu og smyrjioljufiltur)
- FBO (hydraulikfiltur)
- Trelleborg (iðnaðarslangur)
- ABC (dieselmotorar)
- Iveco (dieselmotorar)

## Á goymslu:

**Hydr, slangur og fittings, hydr, rør og fittings, (manøvri- og kúluventilar, kúlu-leigir, hydr. filtur, smyrji- og brennioliu-filtur), koblingar og koblingshúsar, magnetkoblingar, tetningsringar, stempul, stempulstengur o.m.a.**

## KJ-HYDRAULIK

**P/F KÁRI JOHANNESEN, maskinverkstaður**
Postbox 110 FO-530 Kambsdalur (Fuglafjørður) Faroe Islands
Tel. +298 444170 Fax +298 444265
e-mail: kj@kj-hydraulik.com www.kj-hydraulik.com


Salong Yndi
530 Fuglafjørður
Tel. 444 490


Altíð til
dystin fús
FØROYA BANKI


HOTEL
Bílegging av pizza
www.pizza.fo
P.O. Box 97
FO-110 Tórshavn
Tel +298 350 000
Fax +298 350 001
hotel@hotel.fo
www.hotel.fo
Hotel Tórshavn er hotellið í miðbýnum. Hotel Tórshavn virkar bæði sum hotel og sum sjómansheim.
Hotellið hevur 41 seingjarpláss. 20 starvsfólk arbeiða á hotellinum.
Team 85 358000


Ferðaseðlar
www.fonnflog.fo
kring allan knøttin
FONN FLOG
FO-700 Klaksvík · Tel. 456363 · Fax 457373 · fonnflog@fonnflog.fo


FAXE
KONDI
MED DRUESUKKER
www.kondi.dk




**VØRDSLAN**
WEARHOUSE
Í Stað · 530 Fuglafjørður · Tel. 444 747




**TOYSTOVAN** tel. 444637/444075 530 Fuglafjørður

# SV - TRANSPORT

**Allur flutningur við:**

Lastbilum | Kranabilum | Trailarum

Dumparum | Bingjubilum

**530 Fuglafjørður** **tel. 44 41 77**





**Tilfar til umvælingar, ábøtur ella annað....**
**....spyr fyrst hjá okkum!!**

**Fuglafjarðar Timburhandil**
**tel. 444 126**








**Fiskamjøl**



Fiskamjøl er ein proteinkelda, og verður millum annað brúkt til fóðurblandingar til alifisk, høsnarungar, svín og neyt.

**Fiskalýsi**



Lýsið verður brúkt til alifóður, margarin og aðra tøkniliga nýtslu.

**Fiskafóður**



Fóðrið fer til alifisk. Fiskafóður er ein tann orkuríkasti úrdráttur, ið yvirhøvur verður framleiddur.

**Uppisjóvarfiskur**



Uppisjóvarfiskur er bæði matfiskur og fóðurfiskur.

HAVSBRÚN

**HAVSBRÚN**
**Havsbrún Ltd. · 530 Fuglafjørður**
**tel. 444 100 · fax 444 160**
**havsbrun@havsbrun.fo**
**www.havsbrun.fo**



# Frá dreymi til veruleika

Hava tit brúk fyri eini tekning, vilja tit smíðja sjálvi ella skulu tey vera lyklaklár.

Eg bjóði meg til:

- at tekna
- at byggja
- at biðja um tilboð uppá sanitet, el hita o.s.fr.

Ring og eg gevi eitt óbindandi tilboð.

**JLJ - BYGGING**
v. Jørmund L. Juul (verkfrøðingur & húsasmiður)

☎ 21 47 87 & 44 47 87
teldupostur: jljuul@post.olivant.fo



CLIMACOOL RESPW
**800⁰⁰**



REKORD
**700⁰⁰**



A CUB.TWIN STRI
**1.400⁰⁰**



SUPERSTAR II
**700⁰⁰**

**P/F THOMAS DAM**
ÍTRÓTTUR á Glyvrum - Glyvravegur - Glyvrar - tel 44 73 99 - fax 44 73 97



# Fuglafjørður



býurin, har mentan og vinnulív taka lógvatak



býurin, har náttúra og fólk eru blíð

býurin, har fortíð og nútíð hittast

býurin, har øldirnar tala



**Stutt sagt:**



býurin, har nógv hendir

býurin, ið er eina vitjan verdur

**Fuglafjarðar kommuna**
tel. 44 40 06 fax 44 46 57 fko@fuglakomm.fo

## Fuglafjarðar Keypsamtøka

Tel. 444 095 - 444 495
Fax 444 895





Gardintoy
Gardinstengur
Persiennur
Rullugardinur
Liftgardinur
Tógv & stokkar
Uppskriftir

Vit seyma gardinur
Støkk inn á gólvið til eitt gardin ella tógv prát

**Profa Farvur**

v/Petur Gaardlykke · 600 Saltangará · tel. 44 91 49





# Heildarveiting av tí heimskenda merkinum HP (Hewlett Packard)





HEWLETT PACKARD
Expanding Possibilities

**Alt innan heimateldur, virkisteldur, servarar, prentarar, net og mangt annað....**

**Avtala um viðlíkahald av teldum/teldukervi kann gerast út frá tygara tørvi.**

**Arbeitt verður fyri virkir, skúlar og stovnar.**

Vit selja og veita undirvísing í bókhaldsskipanini Stellar Office og Stellar Office Pro

## Atlantic Online Sp/f

Í Støð 8
FO-530 Fuglafjørður
Tlf: +298 444487
e-post: atlantic@online.fo

**Alfa Seafood Sp/f**

Box 10 · FO-530 Fuglafjørður · Tel. +298 44 49 51
Fax +298 44 48 48 · E-mail: alfa@post.olivant.fo

**FAROE**
SEAFOOD

Fiskavirkið í Fuglafirði · Postboks 53 · tel. 444 500 · faks 444 580

**BAADER®**

Vit hava hópin av eykalutum til BAADER-maskinur á goymslu.

Nú umboða vit eisini Fomaco saltsproytur.

**P/F Petur Larsen**




Föroya Bjór
PILSNAR


Reiðari innan frakt-
& sandbátar
Krana- og
lastvognskoyring
Sandsøla
SANDGREVSTUR
Stovnað 1949
530 Fuglafjørður
tel. 444 121
fax 444 921


Hegn
15 ára royndir við tí grøna hegninum!
TEL
31 14 00
Landsins størsti veitari
Seyðahegn • Gásahegn • Hønsanet
Maskinflætningur • Urtagarðshegn
P/F THOMAS DAM
Á HALSI • HEYKAVEGUR 1


B S
P/F BOÐASTEINUR
Bakkavegur 26
FO-530 Fuglafjørður
Faroe Islands
Tlf. +298 444800
Fax +298 444840
E-mail: alibo@post.olivant.fo






Vit hava
útgerðina
til trol-, nóta-
og alivinnuna
VÓNIN
www.vonin.com


HEILDARLOYSNIR TIL ALIVINNUNA
HEILDARLOYSNIR TIL ALIVINNUNA
UNDIRVATNSLJÓS
UNDIRVATNSKAMERA
TRÁÐLEYST VIDEO SAMSKIFTI
ALARMSKIPANIR
PLC-STÝRINGAR
EL-MOTORAR
EL-LUTIR
FREKVENS UMFORMARAR
EL-TALVUR
FYLGISVEINASJÓNVARP TIL SKIP
JT electric
JT electric Ltd. Kambsdalur Faroe Islands Tel +298 474444 Fax +298 474445 jtelectric.com

## *Blómuhandilin*

# *Orkis*

***625 Glyvrar***

*Blómutyssi, plantur, samanplanting, kurv, brúðarblómutyssi, borðprýði, kransar o.a.*

***Stórt úrval av gávulutum***

***tel 44 82 89***
***fax 44 89 89***

## Danny Transport

**Tel. 31 91 92**

**Flutningur um allan heim!**

**Landsins størsta og besta úrval av ítróttarheiðursgávum**

**Steyp**
**Heiðursmerki**
**Heiðursbrøv**
**Toy við búmerki**
**Streamers**
**Klistrimerki**
**Seruppgávur við gravering**

**Vit seta títt búmerki á klistrimerki, streamers, toy, minnislutir og mangt annað**

**FA. EILIF ARGE**
**KLAKSVÍKSVEGUR • 700 KLAKSVÍK**
**TLF. 45 51 64 • FAX 45 75 76**



## Tannlæknastovan

Steintór Larsen tannlækni

Brynhild Maria Lamhauge tannrøktari

Viðtala:
8.00-12.00 og 13.00-16.00

Torkilskrókur 8 530 Fuglafjørður tel. 444 358










**Nissan Micra**

Tann nýggi Nissan Micra er ætlaður at skapa gleði millum fólk.

Tann nýggi Nissan Micra hevur til dømis minsta vendiradius í sínum flokki. Nýggi Micra hevur eisini mest framkomnu lásiskipan hugsast kann. Og tá ið tú setir bilin frá tær, lýsir hann tær heim. Vitjið hjá Nissan við Oyggjarvegin ella vitjið heimasíðuna www.nissan.fo




**P/F Meinhardt Arge**
við Oyggjarvegin
Tórshavn
tel. 345400 • fax 345401

## Bussar til øll endamál



*Serflutningur til rørslutarnaði*
*Bólkaferðir, bæði innan- og uttanlands*
*Ítróttarferðir, bæði innan- og uttanlands*
*Skúlabarnakoyring*
*Bygdaleiðir*
*Bussar frá 7 til 56 persónar*

Spf. AP *Andreas Poulsen* BUSSKOYRING
✆ 22 52 20 - 44 17 20

FO-513 Syðrugøta • e-mail:pouand@post.olivant.fo



## *Heimavirkis søla og framsýning*

*Piddasa handil*

FUGLAFJARÐAR HEIMAVIRKISFELAG

*Gallari Ribarhús*

*Opið er:*
*mán.-fr: 15.00-17.30*
*leyg.: 11.00-13.00*

*Tel. 444 427*





ÚB

## Úrvalsbilar Spf.

- Søla av brúktum innfluttum bilum
- Alt vanligt verkstaðsarbeiði verður gjørt

www.bilar.fo

Bakkavegur • 530 Fuglafjørður • tel. 444 943 • fax 444 638 • Fartel. 281943



GRANNSKOÐARASTOVAN Sp/f
480 Skála tel. 44 16 66 fax 44 18 71






BREYÐMOLIN
530 Fuglafjørður • tel. fax 444 388



HeimaGreiðslan




Tú gert av hvar og nær. Við HeimaGreiðsluni er Sparikassin opin – har og tá tú ynskir tað.

FØROYA SPARIKASSI
www.sparikassin.fo

# EITT GOTT KVINNULIÐ ER Á VEG!

## Vit hava nógvar evnaríkar gentur, sum lættliga (og endiliga) kunnu tryggja okkum eitt gott kvinnulið aftur í bygdini.

Nú kvinnufótbólturin í Føroyum skjótt hevur 20 ár á baki, mugu vit í ÍF ásanna, at vit ikki rættiliga hava megnað at fylgt við seinastu nógvu árini á hesum øki. Tað byrjaði annars væl. ÍF hevði øll tey fyrstu árini lið í 1. deild hjá kvinnum við rímiliga góðum úrslitum, og í 1991 kundi vit rósa okkum av at hava besta lið í landinum. Flestu mundu tá vænta, at kvinnufótbólturin hjá ÍF fór at hava nógv góð ár framyvir, men so var ikki, - tíverri! Ikki tí, - leikararnir á liðnum í 1991 vóru bæði ungir og góðir, men fleiri góvust at spæla, serliga vegna lestur í øðrum londum, og ikki vardi meira enn 2 ár, so var eingin kvinnufótbóltur í bygdini longur.

Hetta má sigast at vera sera óheppið, tí tað er altíð gott hjá yngstu leikarunum at síggja upp til tey, ið spæla í ovastu deildini, og tað vísir seg ofta at vera torført at fáa nakað aftur, sum er dottið niðurfyri.

Tó sær tað nú meira ljóst út fyri kvinnufótbóltinum í Fuglafirði, so vónandi fer ÍF innan fyri tey komandi árini aftur at hava lið við í ovastu deildini í kvinnufótbólti.

ÍF hevur nú aftur havt lið í landskappingini við gentum 14 – 17 ár. Hetta liðið hevur fleiri evnaríkar spælarar, sum um 1 – 2 ár væl kunnu vera við í bestu deildini. Harumframt eru nakrar gentur/kvinnur í Fuglafirði, sum kundu hugsað sær at spælt fótbólt, men sum eru ov gamlar at spæla við teimum 14 – 17 ára gomlu og tí ikki hava nakað lið at venja og spæla við. Hesar kunnu uttan iva mynda eitt 1. deildarlið saman við leikarum, sum í ár spæla við gentum 14 – 17 ár.



Hartil kann sigast, at smágenturnar hjá ÍF (genturnar, sum ganga í 6. og 7. flokki) eisini klára seg avbera væl. Tær hava vunnið innleiðandi bólkin. Tríggjar av hesum gentum spæla eisini við gentum 14-17 ár, og hava tær rættiliga víst hegni og áhuga at spæla fótbólt.

Seinastu tvey mánakvøldini hava óvanliga nógv konufólk verið á vøllinum. Onkur sigur "Old girls", men tað er heldur nógv sagt. Hetta eru kvinnur í øllum aldri, sum hava tikið seg saman aftur at fáa gongd í fótbóltin, og sigast má, at tað er rættiliga stuttligt at síggja, at tær enn duga við bóltinum og enntá eisini megna at bjóða teimum yngru av til dyst.

Tað, at fleiri aldursbólkar spæla fótbólt í senn, má so avgjørt sigast at vera við til at styrkja tað sosiala í felagnum, og hetta ger tað so avgjørt eisini meira hugaligt hjá teimum yngru at halda á fram at spæla fótbólt.

Okkara vón má vera, at ÍF innan fyri tvey tey næstu árini aftur hevur lið í 1. deild, og at arbeiðið í yngru deildunum framhaldandi verður so mikið gott, at til ber at fáa gentur úr øllum aldursbólkum at spæla fótbólt, tá tær gerast vaksnar.





*(framhald av bls. 3)*
dystirnar. –Vit hava ongantíð verið ordiliga trýstir enn, men kortini hava vit ikki vunnið allar dystirnar, vísir Jón á. -Teir taptu nevnliga ímóti LÍF, spældu javnt á Toftum og síðani hava teir vunnið tríggjar sannførandi sigrar. Við hesum úrslitum liggja teir á einum 4. plássi við 10 stigum, líka mongum stigum sum Sumba og AB. Tí verða TB´arnir uppsettir í dag, og fara í fyrstu atløgu helst eftir einum stigi, væl vitandi um, at trý stig eru at heinta.

Men vit eru eisini væl fyri til dystin í dag eru vit væl fyri. Allir leikararnir eru tøkir. Tí verður byrjunaruppstillingin helst tann sama sum undanfarnu dystirnar. Einasti nýggi leikarin í hópinum hesaferð er Árni hjá Bergi. Tað er fyrstu ferð, hann er við í ár. So nú er tríggir av Petersen-beiggjunum á liðnum, og tað man eisini verða nýtt met, her í bygdini í øllum førum.

Vit gleða okkum til dystin í dag, sum er rættuliga avgerðandi, hvussu toppurin í deildini fer at hátta seg. Vinna vit, so eru vit heili 8 stig frammanfyri TB. Endar dysturin hinvegin við javnleiki ella vit tapa, so er støðan ein heilt onnur. –Tá gerst longu nú veruligur spenningurin um bestu plássini í deildini.

Vit mugu samstundis hyggja at hinum báðum liðunum, sum hava 10 stig áðrenn dystin í dag. -Sumba leikar ímóti B71 á Sandi, meðan AB leikar ímóti B36 í Havn. Okkara vón er sjálvsagt at ávíkavist B71 og B36 vinna hesar dystirnar, samstundis sum vit vinna í dag. So er kósin veruliga sett. Vit kunnu altíð vóna, men innsatsurin á vøllinum og uttanfyri verður aftur avgerðandi í dag, eingin ivi um tað.

Drívið tí á, og stuðli okkara monnum; tað hava teir brúk fyri!






FLÜGGER
- Dygdarmáling til lágan prís
- Lyklar, innramming, gólvtilfar og fiskireiðskap til smábátin

*Tasjan á Bugnum*
530 Fuglafjørður
tel. 44 50 44
fartel.: 22 11 09

# ÁRSINS ÍF´ARI 2003

## ÁKI BESTUR Í DYSTINUM



Í dystinum ímóti VB næstseinasta vikuskiftið komu serliga mangar atkvøður inn. Ákoðararnir valdu Áka at vera besta leikarin, og vit kunnu bert taka undir við, at hann spældi ein góðan dyst. Fyri at vera besti leikarin fær Áki ein døgurða-bita fyri tvey frá Pól á Muntra. Vit ynskja honum tillukku!

**Atkvøðutal**

| | ÍF-VB | Íalt |
|---|---|---|
| Áki Petersen | 112 | 191 |
| John S. Thomsen | 68 | 146 |
| Hanus Eliasen | 68 | 185 |
| Atli Petersen | 56 | 100 |
| Eyðolvur R. Petersen | 48 | 119 |
| Høgni Zachariasen | 46 | 90 |
| Fróði Poulsen | 42 | 42 |
| Sverri Ellingsgaard | 39 | 117 |

Atkvøtt verður til allar heimadystirnar í landskappingini ella íalt 9. Tann leikari, sum veljarin heldur hevur spælt best, fær 5 stig, næstbesti 3 stig og triðbesti 2 stig.

Atkvøðuseðlarnir fáast í ovaru hæddini í ítróttarhúsinum. Seðilin her á síðuni kann eisini nýtast. Hvør veljari hevur bert loyvi at lata ein seðil inn til hvønn dyst.

### VINNINGAR

- Ársins ÍF´ari fær 1.000,-
- Nr. 2 fær 500,-
- Nr. 3 fær 500,-

Fa. Eilif Arge í Klaksvík letur prýðislutir til nr. 1, 2 og 3.

Restaurant Muntra letur sunnudagsdøgurða fyri tvey til besta leikaran í hvørjum av landskappingardystunum í ár.

Tá kappingarárið er av, verður lutakast millum allar atkvøðuseðlarnar um eitt krov frá Haraldsen.

**HARALDSEN**
- títt keyp -

## Atkvøðuseðil

ÍF - TB, 21. juni 2003

Dystur: ____________

Nr. 1 (5 stig): ____________
Leikari

Nr. 2 (3 stig): ____________
Leikari

Nr. 3 (2 stig): ____________
Leikari

Veljari: ____________ Tel.: ____________

*Atkvøðuseðilin skal latast inn í ovaru hæddini í ÍF-húsinum seinast 15 min. eftir loknan dyst.*





# SØLUBÚÐIN ER FRAMVEGIS Í OVARU HÆDDINI

Damurnar, sum síðstu árini hava havt sølubúð í ovaru hæddini í ítróttarhúsinum í sambandi við dystir hjá 1. liðnum, eru aftur í ár til dystin fús. Hildigarð stendur fyri, men hon fær góða hjálp frá øðrum. Í sølubúðini selja tey sodavatn, kaffi, te, køkur og góðgæti. Sølubúðin hevur opið frá dystarbyrjan til beint eftir dystin. Tað er eisini í sølubúðini, at tey, sum atkvøða um ársins ÍF´ara og tey sum gita í kappingini ÍF TIPS 13, skulu lata seðlarnar inn.

Sjálvt um hølisviður-skiftini ikki eru av teimum bestu, so er tað eisini í sølubúðini, at prátið um dystin, leikararnar og venjarin fer fram - bæði í hálvleikinum og eftir dystin.



### ÍF TIPS 13 - vinnarin og svarini frá síðstu kappingini

Ólavur Larsen gjørdist besti tipparin seinast. Hann hevði øll 13 røtt, og hann er tískil besti tipparin higartil. Hann fær ein kassa av sodavatni frá Føroya Bjór. Tillukku við tí. Hann sleppur somuleiðis út at bowla við 1. liðshópinum seinni í heyst, og so er hann eisini við í lutakastinum um Apex-flogferðaseðilin frá Atlantic Airways.

Røttu svarini til teir 13 spurningarnar seinast eru:

| ÍF TIPS 13 - Spurningar og svar - 3. Umfar: | Tekn: | Svar: |
|---|---|---|
| 1. Hvussu eitur málverjin hjá EB/Streym? | 2 | *Gunnar á Steig* |
| 2. Hvar er Frank Skytte venjari? | 1 | *HB* |
| 3. Nær bleiv B71 stovnað? | 1 | *1970* |
| 4. Hvørjum liðið heldur Trúgvi við í Onglandi? | 1 | *Liverpool* |
| 5. Hvørjum liðið hevur Jes Høgh <u>ikki</u> leikt fyri? | X | *Besiktas* |
| 6. Hvat land umboðar Emmanuel Olisadebe? | 2 | *Póllandi* |
| 7. Hvussu eitur heimavøllurin hjá Portsmouth? | X | *Fratton Park* |
| 8. Hvør hevur metið sum tann yngsti leikarin, ið hevur leikt í Premier League? | 1 | *Andy Campbell* |
| 9. Hvat lið hevur fingið fægst stig í einum kappingarári í Premier League (1992-2003)? | X | *Sunderland* |
| 10. Hvat er fjarstøðan frá mállinjuni út til brotssparksplettin? | X | *11 metrar* |
| 11. Hvar leikti Michel Salgado áðrenn hann kom til Real Madrid? | 2 | *Celta Vigo* |
| 12. Málspark: Málverjin sparkar til bóltin í hørðum mótvindi. Bólturin fer út um brotsteigin og fýkur síðani við vindinum inn í egið mál... Hvat ger dómarin? | 1 | *Hann dømir hornaspark* |
| 13. Hvussu nógvar dystir leikti Franco Baresi fyri AC Milan? | 1 | *716* |

**Ítróttarfelag Fuglafjarðar**
**Postboks 94**
**530 Fuglafjørður**
**Tel. 444 636**
**Fax 444 636**

***Aðalnevndin:***
Formaður
Rúni Petersen, tel. 215887
2. formaður
Høgni á Lakjuni tel. 444418
Peningarøkil:
Linda Joensen, tel. 445132
Skrivari:
Hildigarð Eliasen, tel. 444052/228771

***Fótbóltsdeild:***
Hildigarð Eliasen tel. 444052
Eivin Breiðaskarð, tel. 214003
Ólavur Larsen, tel. 224659
Mortan Nónsgjógv
Atli Petersen, 444 018

***Venjarar:***
***2. deild:***
Sigfríður Clementsen, tel. 31 76 59
***3. deild:***
Báðrur Mortensen, tel.
***4. deild:***
Eivin Breiðaskarð, tel. 21 40 03
***Old Boys:***
Sonni Jensen, tel. 444 975
***Unglingar:***
Birgar Larsen, tel. 21 37 10
***Dreingir Ø.:***
Janus Petersen, tel. 26 43 99
***Smádreingir Ø.:***
Ragnhard Petersen, tel. 26 02 90
***Smádreingir 1/2 vøllur***
Ragnhard Petersen, tel. 26 02 90
***Piltar 1/2 v a-b.:***
Hanus Eliasen, tel. 22 17 52
***Smápiltar:***
Atli Petersen, tel. 26 82 95
***Gentur:***
Durita Djurhuus, tel. 44 50 24
***Smágentur:***

***G.10-12 ár:***
Jónfríð Joensen, tel. 254170
***Yngst:***
Hanna Poulsen

| ÍF | TB |
|---|---|
| 1. Fróði Poulsen | ____ Poul Eli Bærentsen |
| 2. Áki Petersen | ____ Einar Petersen |
| 3. Jan Skoradal | ____ Jens Rói Sørensen |
| 4. Viggo Johannesen | ____ Mortan Enni |
| 5. Heini Heinason | ____ Rasmus Nolsøe |
| 6. Fritleif í Lambanum | ____ Bárður Dimon |
| 7. Martin Hansen | ____ Olivur Abrahamsen |
| 8. Sverri Ellingsgaard | ____ Dan Mortensen |
| 9. Rúni Petersen | ____ Allan Mikkelsen |
| 10. Hanus Eliasen | ____ Kaj Roest |
| 11. Eyðolvur R. Petersen (liðsk.) | ____ Allan Poulsen |
| 12. Rógvi Róin | ____ Andrass Nolsøe |
| 13. Høgni á Lakjuni | ____ Allan Smedmark |
| 14. Ken Bærentsen | ____ Jón Johannesen |
| 15. Eyðun Ryggshamar | ____ Kim Roest |
| 16. Jákup Helgi Egholm | |
| 17. Høgni Zachariassen | |
| 18. Atli Petersen | |
| 19. Roy Róin | |
| 20. John S. Thomsen | |

| ÍF | | TB | |
|---|---|---|---|
| Venjari: | Sigfríður Clementsen | Venjari: | Jón Johannsen |
| Hj.venjari: | Rógvi Róin | Hj.venjari: | Poul F. Joensen |
| Liðleiðarar: | Trúgvi Nesá<br>Tórstein Joensen | Liðleiðari: | Petur Joensen |

**Dómari: Georg Rasmussen, B36**
**Hjálpardómarar úr B36**

**Jón N. Olsen**